# Smábørn gjørdu herverkið

**HERVERK** Meðan børnini vóru í barnagarði á Sandi, snýktu nøkur seg til at gera umfatandi herverk á eini fólkatóm grannahús



Ellivu rútar knústu børnini

Randi Jacobsen

Fyri góðum tveimum mánaðum síðan vóru Anna og Tormóður Stórá í Skopun illa við, tí fleiri herverk vóru framd móti ognum teirra.
Tað bar av, tá ið tey ein dag fingu at vita, at umfatandi herverk var framt móti barnaheimi hennara á Sandi. Ellivu rútar vóru knústir. Húsini undir Skarði eiga hon og beiggin.

Tey ivaðust ikki i, at onkrir unglingar høvdu verið upp á spæl.

Men nú er komið undan kavi, at tað vóru barnagarðsbørn, sum framdu herverkið. Okkurt barn hevur fortalað seg.
Anna Stórá var fegin, tá ið eini foreldur ringdu til hennara.

– Tað er dámligt, at foreldrini sjálv venda sær til okkara, sigur Anna Stórá.

Hon er hørm um tað, sum hent er, og nógv verður at taka upp, tí glassplintur eru farin um alt húsið.

**Børn eru børn**

– Hetta er keðiligt, men vit mugu kortini minnast til, at børn eru børn, sigur hon.

Politiið hevur sum so ikki verið inni í málinum. Lagt er upp til at loysa málið millum húseigararnar, foreldrini og barnagarðin, sum er í gamla skúlanum beint við illa viðfarnu húsini.

Til ber at spyrja, hvussu børn, sum verða ansað í barnagarði, kunnu sleppa til at gera so umfatandi herverk, ið neyvan er framt eftir eini lítlari løtu.

Leiðarin í barnagarðinum hevur onga viðmerking.

*randi@sosialurin.fo*

# Fara til Noregs eftir Hallarkletti

**SKIPAMÁL** Tað hevur ikki eydnast reiðaranum Bjarta Mohr at fáa norsku myndugleikarnar at gjalda havnaútreiðslurnar fyri Hallarklett, Kasablanka, sum í næstan trý ár hevur ligið í Ålesund. Men nú vil hann hava skipið leyst og leggur í yrsta lagi út sjálvur

Randi Jacobsen

Nú er líkt til, at keðiligi tátturin í søguni hjá føroyska skipinum Hallarkletti er við at fáa ein enda.

Reiðarin Bjarti Mohr hevur tikið avgerðina um, at í næstum fara fýra-fimm menn eftir skipinum.

Søgan er eitt sindur fløkjut. Bjarti Mohr leigaði Hallarklett út til eitt rissikt felag, sum gav skipinum navnið Kasablanka.

Fyri smáum trimum árum síðan varð skipið tikið fyri at hava ov nógva veiðu, og tá ið russiska reiðaríið ikki megnaði at gjalda bótina, varð hald lagt á skipið. Kasablanka hevur síðan ligið í Ålesund.

Líka síðan hevur Bjarti Mohr togast við norsku myndugleikarnar og havnamyndugleikarnar um at fáa skipið aftur, men einki er komið burtur úr samráðingunum.

– Havnamyndugleikarnir halda fast við, at vit skulu gjalda havnagjaldið, umleið 400.000 krónur, fyri at fáa skipið leyst. Men mín pástandur er, at norsku myndugleikarnir mugu gjalda, tí skipið var leigað út, tá ið tað varð tikið, sigur Bjarti Mohr.

Nú vil hann gera alt fyri at fáa skipið aftur. Helst verður tað til, at hann leggur sjálvur út fyri havnapengarnar, og so ber til at fáa trætuna avgjørda í rættinum.

– Hallarklettur er eitt deiligt skip, sum er væl hildið, og tað krevur ikki nógv at pussa hann uppaftur, sigur Bjarti Mohr.

Hallarklettur hevur onga kvotu, men Bjarti Mohr sigur seg hava góðar møguleikar fyri at fáa hendur á kvotum uttanlands.




*Sambært Bjarta Mohr fer Kasablanka ella Hallarklettur skjótt at loysa*